# Tíggjundi hvør føroyingur útihýstur frá fólkaræðinum

FÓLKARÆÐI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hvussu skulu tey, sum hoyra illa, vita, hvønn tey skulu velja á løgtingsvalinum tann 19. januar.

Tað er ein spurningur, sum ráðið fyri Ráðið fyri Brekað nú roynir at seta ljóskastaran á í sambandi við, at valstríðið til løgtingsvalið verður harðari og harðari fyri hvønn dag, sum gongur.

- Tað er torført at fáa innlit í politisk viðurskifti, tá hoyrnin svíkur, tí tá er ringt at fylgja við í politiskum orðaskifti, sigur Nicolina Dahl, sum er hoyribrekað og sum nú ger vart við seg eftir áheitan frá Ráðnum fyri brekað.

- Flestu borgarar fáa kunning um politisk viðurskifti gjøgnum útvarp og sjónvarp, men hoyribrekað eru útistongd frá øllum tí gerandisliga politiska kjakinum, tí tey ikki klára at fylgja við í útvarpi og hoyra ikki tað, ið sagt verður í sjónvarpi, sigur hon

- Tí er verri hjá einum hoyribrekaðum yvirhøvur at fáa sær eina politiska meining, leggur hon afturat.

Tí heldur hon, at skulu hoyribrekað og deyv hava nakran møguleika at fáa nakað burturúr valsendingum í sjónvarpinum, krevst, at nakað verður gjørt.

- Valsendingarnar eru kunnandi og eiga at venda sær til allar veljarar, men hoyribrekað og deyv fáa ikki hesa kunning. Har krevst fyrst og fremst teksting á sjónvarpi í breiðari merking. Sum minsta mark mugu tíðindasendingar tekstast og tað átti at veri ásett við lóg, at valsendingar vera tekstaðar. Alt annað er ódemokratiskt, staðfestir Nicolina Dahl.

## Hoyrnalykkjur, tulkar og tekstir

Nicolina Dahl staðfestir, at politiskur áhugi byrjar í nærumhvørvinum og tí eiga allir býráðssalir at hava hoyrnarlykkju!

- Umleið tíggindi hvør føroyingur hoyrir ikki nóg væl og talið er vaksandi. Vit vita, at tað tekur ár frá tí, at brekið byrjar at níva og til fólk leita sær hjálp. Tað sama má vera galdandi hjá teimum, sum sita á valdinum. Hoyrnarlykkja eigur sjálvandi at vera í tingsalinum til gagns fyri tingfólk og áhoyrarar.

Felagið fyri hoyribrekað heitir somuleiðis á tey, ið skipa fyri valfundum, um at hava hoyrilíkindini í huga og hava hoyrnarlykkju til taks.

Samstundis vísir hon á, at teknmálstulking hevur havt ovurstóran týdning fyri tey deyvu.

- Tað eigur at tryggjast, at tulkarnir fáa bestu umstøður at arbeiða undir í valstríðnum. Nú vantar skrivitulking til fólk, ið gerast deyv, eftir at tey eru vorðin vaksin og tí ikki læra teknmál. Skrivitulking er ein avgerandi fortreyt fyri, at hoyribrekað kunna vera við í politiskum arbeiði.

- Okkara meining er eisini verd at hava við í kjakinum og okkara íkast er líka nógv vert sum tað hjá øllum øðrum. Okkara atkvøða telur líka nógv sum hinar, sigur Nicolina Dahl.

Við Rás 2 fríggjadagin segði Barbara á Tjaldrafløtti, at Ráðið fyri brekað ætlar at seta seg inn í viðurskiftini hjá autistum, sjónveikum og hoyribrekaðum og vita, um tey velja, ella, hvussu tey velja.

FØROYABANKI
www.sosialurin.fo

Fyrilestur í miðlahúsinum

**Komst tú ikki inn á pedagogútbúgvingina? tú kanst enn náa tað!**

Jens Maibom Pedersen, cand. theol og fyristøðumaður á Diakonháskúlanum, heldur eitt upplegg um útbúgvingarnar á háskúlanum saman við Beintu Joensen, sum hevur tikið útbúgving á skúlanum.



Jens Maibom Petersen

**Mánadagin 3. desember kl. 19.30**

Vit borðreiða við kaffi og smákøkum.

***Øll eru vælkomin***




Tórsgøta 1 · Tel 34 18 00 · Fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo

miðlahúsið í Vágsbotni



LÆRLINGUR TIL 2X3

Vegna vaksandi virksemi sóknast vit eftir dugnaligum og eldhugaðum lærlingi til amboð og maskindeildina í 2x3 í Tórshavn, at byrja skjótast gjørligt.

**Vit bjóða**
eina útbúgving í eini framkomnari fyritøku, har vit við at seta tænastu og góðsku í hásæti virka í einum spennandi og vaksandi virkisøki innan handil.
Tú kemur sum lærlingur at virka í einum vælvirkandi toymi av starvsfólki, sum seta tænastuna og gott arbeiðsumhvørvi í hásæti.

**Starvið**
inniber, at tú sum frálíður ført ábyrgd av ávísum økjum hoyrandi til deildina. Í tøttum samstarvi við hinar deildirnar verða høvuðsuppgávurnar hjá tær hesar:
- søla og innkeyp
- kundaavgreiðsla
- ráðgeving og vegleiðing
- tilboðsarbeiði

**Lærutíðin**
er 3 ár um umsøkjarin hevur lokið FHS-prógv, og 2 ár um HH útbúgving er lokin.

**Vit vænta**
at tú ert málsøkin, røkin, setur kundatænastu í fremstu røð, og hevur evni og viljan at verða ein virkin luttakari millum dugnaligar starvsfelagar.

**Tú fært**
eitt spennandi læripláss, har tú kanst menna tíni evni innan sølu og tænastu á einum stórum og virknum arbeiðsplássi.
Løn og setanartreytir verða sambært avtalu.

**Umsóknarfreistin**
er jólaaftan 2007, og skulu umsóknir sendast til:

2x3
Heykavegur 4
Boks 3038
110 Tórshavn
Att.: Jan á Argjum

2X3
TIMBUR HANDILIN



# Jól í Glasstovuni

**1. desember, 7. desember, 14. desember og 15. desember bjóðar Glasstovan stóra jólamatskrá**

**5 rættir:**
- **Føroyskur tallerkur.**
- **Toskanakki við safransós og saute.**
- **Berberidunnubringa og svínalundir við lakaðum blommum og rótfruktum, pom anna og orangessós.**
- **Osta volauvent.**
- **Mandlurís við karamelkremi og kanelísi.**

**Prísur fyri hvønn kr. 525,-**

**Íroknað prísin er:**
**5 rættir, drykkivørur og dansur.**

**Bíleggið borð á tel. 317500**
**ella á hf@hotelforoyar.fo**

GLASSTOVAN
*The Favourite Restaurant*

Tel 31 75 00 • hf@hotelforoyar.fo

hotelforoyar.fo